




## Vit hava kempað

**Meinhard Jacobsen,** *fyrrverandi stjóri í Faroe Seafood.*

**Hvat gekk galið?**
- Tað eru nógv viðurskifti, sum hava gjørt, at Fiskavirking er komið í hesi støðu. Tann einkulta hendningin, sum rakti okkum meinast, var tá í Kaupthing í 2008 slapp sær av við sítt virksemi í Føroyum og rýmdi av landinum.

Tað segði Meinhard Jacobsen við Dag og Viku fríggjakvøldið.
Hann legði aftrat, at fiskiskapurin eisini hevur verið sera vánaligur.
- Eitt skifti í fjør var frægari, og tá gekk eisini betri hjá okkum, men síðani hevur fiskiskapurin fullkomiliga svikið aftur, segði hann.

**Hvat iðrar tú teg um?**
- Tá russisk skip fóru at keypa fisk í Føroyum, fingu vit ein kvøkk, og tá fóru vit undir at útvega okkum skip. Man kann iðra seg um onkra avgerð, men ólukkurnar raktu okkum sum perlur á snóri, og tað toldi felagið ikki . Oljuprísurin hevur verið sera høgur, fiskiskapurin hevur verið vánaligur, og rentan hevur verið í topp.

**Tit royndu sum longst?**
- Ja, eg renni ikki undan mínari ábyrgd. Eg havi verið við allan vegin. Eg havi allatíðina tikið støðuna í størum álvara, og eg havi kempað til tað síðsta, segði Meinhard Jacobsen, fyrrverandi stjóri í Faroe Seafood.

# Norðborg farin nýggjan túr



Hetta er túrur nrummar 22 í røðini í ár, sum Norborg nú er farin á - og teir lata so væl at, tí hvør hevur verið betri enn annar.

Síðsti túrur var stuttur, bert 14 dagar frá tí teir loystu, til teir bundu aftur, og tá fór nógv tíð í sigling. Hetta er tann túrurin, teir hava fiskað skjótast og fingið mest niður pr. døgn.

Teir høvdu smá 1.400 tons, meginparturin sildafløk, 300 tons av mjøli og 150 tons av lýsi.

Teir vóna at vera aftur í rímiligari tíð fyri jól og eru annars væl nøgdir við fiskiskapin í árinum fram til nú.

Áðrenn farið varð avstað í dag var samkoma umborð, har Jákup Hansen, Rógvi Joensen og Kristian Martin Rasmussen høvdu eitt orð og síðani varð eisini sungið. Teir løgdu skip og manning í Harrans hendur og bóðu eftir einum góðum túri.

*Tekstur og myndir: Dávur Winther*




## Í MORGIN

**-2/+1 °C**




Lot til andøvsgul av norði og sólglottar, men eisini kavæalingur. Hitalagið millum -2 og +1 stig.

## MIKUDAGIN

**-2/+1 °C**




Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Sólglottar, men eisini okkurt kavæalið. Hitalagið millum -2 og +1 stig.

## HÓSDAGIN

**1/4 °C**




Lot til andøvsgul av ymsum ættum, seinnapartin frískar hann vindin av vestri. Vátakavi, seinni regn og hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 7 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 976 hPa. vestan fyri Lofoten stendur mestsum í stað og grynnist.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Ísland fer í landsynning og gevur minkandi høgættavind við Føroyar.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 142 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

30. november Mánin næstur jørðini
5. desember Tendring
13. desember Fyrra kvarter
Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. des | 06:41 | 19:09 | 05:41 | 18:09 | 05:56 | 18:24 | 08:41 | 21:09 | 09:41 | 22:09 | 04:56 | 17:24 | 03:56 | 16:24 | 06:56 | 19:24 | 07:56 | 20:24 | 06:26 | 18:54 | 07:41 | 20:09 |
| 7. des | 07:36 | 20:03 | 06:36 | 19:03 | 06:51 | 19:18 | 09:36 | 22:03 | 10:36 | 23:03 | 05:51 | 18:18 | 04:51 | 17:18 | 07:51 | 20:18 | 08:51 | 21:18 | 07:21 | 19:48 | 08:36 | 21:03 |
| 8. des | 08:28 | 20:53 | 07:28 | 19:53 | 07:43 | 20:08 | 10:28 | 22:53 | 11:28 | 23:53 | 06:43 | 19:08 | 05:43 | 18:08 | 08:43 | 21:08 | 09:43 | 22:08 | 08:13 | 20:38 | 09:28 | 21:53 |
| 9. des | 09:16 | 21:39 | 08:16 | 20:39 | 08:31 | 20:54 | 11:16 | 23:39 | - | 12:16 | 07:31 | 19:54 | 06:31 | 18:54 | 09:31 | 21:54 | 10:31 | 22:54 | 09:01 | 21:24 | 10:16 | 22:39 |
| 10. des | 10:00 | 22:22 | 09:00 | 21:22 | 09:15 | 21:37 | - | 12:00 | 00:39 | 13:00 | 08:15 | 20:37 | 07:15 | 19:37 | 10:15 | 22:37 | 11:15 | 23:37 | 09:45 | 22:07 | 11:00 | 23:22 |